einfaldari
- ger tað einfaldari
oktober 2010

ALTJÓÐA LEIÐARASTEVNAN 2010

Altjóða leiðarastevnan The Globale Leadership Summit 2010 verður í Norðurlandahúsinum dagarnar 22. og 23. oktober.

Sjálv leiðarastevnan varð hildin í Chicago dagarnar 5. og 6. august 2010. Tað eru talarar á hesi stevnuni, ið koma at hava sínar framløgur, sum verða sýndar á stórskíggja í Norðurlandahúsinum.

The Globale Leadership Summit er eitt gott høvi at møta sum toymi og at droyma saman burturi frá dagsins føstu mannagongdum og ábyrgdum. GLS er eitt eggjandi og kveikjandi amboð hjá seriøsum kristnum í hesi heimsumfatandi leiðslurørslu, har leiðarar, umboðandi eitt undrunarvert fjølbroytni av fólkasløgum, etniskum bólkum, ymsum tungumálum og trúarbólkum, koma saman at yvirgeva seg til at loysa og endurbyggja henda falna heim.

Í ár verður The Globale Leadership Summit, sum byrjaði í 1995, í 350 býum í fleiri enn 50 londum, har 120.000 leiðarar frá fleiri enn 10.000 kirkjum og samkomum møta til at fáa íblástur, vegleiðing og førleikamenning. Eftir ætlan verður tað Føroya løgmaður, Kaj Leo Johannesen, sum kemur at seta leiðararáðstevnuna. Tilmelding og gjalding á www.gls.fo

lívdin
– í lívd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

Nýggj reformatión

Tann 31. oktober í 1517 negldi Martin Luther teir 95 setningarnar upp á dómkirkjuhurðina í Wittenberg í Týsklandi. Hesir rannsakandi og beinraknu spurningar kveiktu reformatiónina, ið kom sum ein flóð yvir alt Evropa – líka til okkara oyggjar. Luther brendi fyri Bíbliuni, frelsu við trúgv, náði og Kristusi. Slagorð hansara vóru Sola Scriptura, Sola Fide, Sola Gratia og Soli Kristi. Mátti Gud kveikt eina nýggja reformatión í lívum, samkomum og landi okkara, so vit av nýggjum fara at brenna fyri myndugleika Bíbliunar, frelsu við trúgv eina, náði Kristusar og persóninum sjálvum – Jesusi Kristi. Hetta er ein av bønunum fyri lívi mínum. Vilja tit biðja saman við mær?

Jógvan Zachariassen

Hendingar & tiltøk

Innsavningingarátak

Fleiri nýttu høvið at skriva eina heilsan til familjuna Vang

Lívdin hevur skipað fyri eini innsavning til Tórvør og Einar Vang, sum eru í Danmark við soninum Edvard, sum kom til skaða í eini ferðsluvanlukku. Edvard er til uppvenjing á sjúkrahúsinum í Hvidovre.

Fólk í samkomuni kundu flyta pening á konto hjá Lívdini, sum síðani varð fluttur sum ein felagsgáva frá Lívdini til Tórvør og Einar.

Sunnudagin 26. september var møguleiki hjá fólki í samkomuni at skriva eina heilsan á eitt kort til teirra fyri at uppmuntra og troysta tey. Kontonummarið hjá Lívdini til gávur til Tórvør og Einar er í Eik: 9181-162.456.5.

Minnist til skógvaeskjurnar

Seinasta freist at lata skógvaeskjur inn til Christmas Child 2010 er 31. oktober 2010.

Sí meira á www.livdin.fo

Tíggjundi hvør var føroyingur

Í døgunum 29. juli til 4. august 2010 var altjóða ungdómslegan TeenStreet hildin í Oldenburg í Týsklandi. Blaðið OM Danmark skrivar, at av teimum 3.500 luttakarunum úr 20 ymiskum londum var næstan ein tíggjundapartur úr Føroyum. Luttakaratalið úr Føroyum er vaskið sera nógv seinastu árini. Í 2008 vóru 130 luttakarar, í 2009 vóru 208 luttakarar og í 2010 vóru 318 luttakarar úr Føroyum.

Til lukku við føðingardegnum

Rúna Berghamar 60 ár
Leygardagin 18. september fylti Rúna Berghamar 60 ár. Føðingardagurin varð hildin í Pálsstovu.

Til lukku við silvurbrúdleypinum

Anna og Pætur silvurbrúdleyp
Hósdagin 16. september vóru 25 ár liðin, síðan Anna og Pætur Háberg giftust. Silvurbrúdleypið varð hildið í Sjónleikarhúsinum leygardagin 11. september.

Mynd: Facebook

Seinasta bønarmøtið á Brekku

Seinasta bønarmøtið á Brekku var týskvøldið 28. september. Takkað verður fyri góðu tíðina á Brekku, men samstundis verður biðið fyri nýggjum hølum til samkomuna at brúka mitt í viku.

Umseting í oyrasnigli

Ian Burness talaði um evnið mission

Lívdin bjóðar nú beinleiðis umseting av talunum sunnudagar fyri bæði útlendingar og føroyingar.

Vanliga verður umsett úr føroyskum til enskt, men tá útlendskir talarar vitja, sum tosa eitt nú enskt, verður talan umsett til føroyskt fyri tey sum hava tørv á tolki. Hetta verður gjørt við einum tóli við oyrasnigli, so síðumaðurin ikki verður órógvaður.

Poul F. Guttesen umsetti taluna til føroyskt

Tá Ian Burness frá enska trúboðarafelagsskapinum Echoes of Service talaði sunnudagin 19. september, umsetti Poul Guttesen taluna til føroyskt.

Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

Sunnudagin 3. oktober

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta: Kreativur bólkur*
Tilbiðjan: Hugleiðing hjá Lív Clementsen

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Er Bíblian álítandi?*
Talari: Høgni Johannesen

Lív

Sunnudagin 10. oktober

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Kreativur bólkur*

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Flokkadráttur*
Talari: Jógvan Zachariassen

Høgni

Sunnudagin 17. oktober

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Sangmøti við Annu Háberg*

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Fólk eftir hjarta Guds*
Talari: Poul Guttesen

Jógvan

Sunnudagin 24. oktober

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Hjartaprát*
Talari: Jógvan Zachariassen

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Møguleikar og avbjóðingar í samfelagnum*
Talari: Símun Absalonsen

Anna

Sunnudagin 31. oktober

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta: Kreativur bólkur*

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Reformatiónsandin: Rættvísgering av trúgv*
Talari: Jógvan Zachariassen

Poul

Umgdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00

Símun

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson